# 151 *Guds synir opinberast*

## (Rómbrævið 8:19)

1. Skjótt opinberast synir Guds,
og tíðin kemur brátt,
tá teir í dýrd við Kristusi
sum kongar fáa mátt.

(*NIÐURLAG*)

*Skjótt opinberast synir Guds,*
*teir hevja rættarsvørð*
*og sigra víst við Kristusi,*
*um orrustan er hørð.*

2. Úr himli hoyrist lúðurin,
hann gellir síðstu ferð,
tá kongur konga savnar øll,
ið bíða honum her.
(*Niðurlag*)

(*BRÚGV*)

Sí synir Guds við Kristusi,
teir stríða síðsta stríð.
Sum lambsins brúður gleðast teir
við honum alla tíð.
(*Niðurlag*)

*snylpnw*-FR Nr. 151 4/16
© 2016 Watch Tower Bible and Tract Society of Pennsylvania

(Sí eisini Dán. 2:34, 35; 1 Kor. 15:51, 52; 1 Tess. 4:15-17.)